

# Vilt tú lata hurðar upp?

## Skyn søkir eftir húsameklara

Føroya Banki fer í næstum at lata upp Skyn, ið fer at handla við fastognum. Saman við leiðandi meklaranum og einum samskipara verður tú partur av einum ágrýtnum toymi, sum miðvíst arbeiðir fyri einum góðum úrsliti. Vit bjóða eitt gott fakligt arbeiðsumhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Skyn leggur dent á álítandi ráðgeving, trúvirði og varandi kundanøgdsemi.

Vit sóknast eftur einum persóni við húsameklaraútbúgving ella viðkomandi útbúgving ella starvsroyndum.

Arbeiðsuppgávurnar eru millum annað:

- Framsýning av ognum
- Meting av ognum
- Papírsgongd frá A–Ø
- Umsiting av heimasíðu
- Stýring av boðsrundum

Tú hevur stóran áhuga fyri sethúsum og húsamarknaðinum. Vit leggja stóran dent á, at tú ert opin og dugir væl at skapa samband við kundar okkara. Tú hevur hug at selja, ert álitisvekjandi og kanst arbeiða skiftandi tíðir.

Vilt tú hava nærri at vita um starvið, kanst tú venda tær til Torgun Davidsen, stjóra, á telefon 557400, ella senda henni eitt teldubræv á torgun.davidsen@foroyabanki.fo.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. januar 2007 kl. 12.
Send umsókn við útbúgvingarprógvi, CV og viðmælum til:

Skyn
C/o Føroya Banki
Att.: Torgun Davidsen
Postsmoga 3048
110 Tórshavn

REPROZ

Skyn

Skyn er partur av Føroya Banka

STARVSLÝSING

## Námsfrøðingar til Barnagarðin á Gásamýri

Søkt verður eftir tveimum námsfrøðingum til barnagarðin á Gásamýri at byrja 1. februar 2007 ella eftir nærri avtalu. Størvini eru 30 og 35 tímar um vikuna.

Í barnagarðinum eru 30 børn í aldrinum 3-6 ár, harav børn við serligum tørvi.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiðspláss, har tú fært høvi til at seta tín dám á.

**Vit vænta at tú ert:**

- skapandi
- fleksibul
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- initiativrík/ur

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til kommununa á tlf. 443006. Um so er, at eingin námsfrøðingur søkir starvið, kunnu onnur søkja arbeiðið sum hjálparfólk í tíðaravmarkað starv.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. januar 2007.

Leirvíkar Kommuna
Postboks 42

Leirvíkar Kommuna
Postboks 42, 520 Leirvík




# SKRIVSTOVUFÓLK

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Akfaradeildina at byrja skjótast gjørligt. Talan er um eitt fast fulltíðarstarv.

### UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting av akførum
- Avgreiðslu av skrásetingargjøldum
- Eftirstøðumál
- Kassauppgerð

### FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovu-útbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni og er fyrikomandi. Kunnleiki at arbeiða við teldu er eisini ein treyt.

### SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjar-málaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Hans Jacob Stenberg, deildarleiðara, á telefon 35 04 08. Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **15. januar 2007**. Tey, ið longu hava søkt starvið, nýtast ikki at senda inn nýggja umsókn.

*Akstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 20 fólk.*

REPROZ

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo